# Hendur og Hugflog í Íslandi

**16 einstaklingar úr Føroyum og fyritøkur fara nú yvir til Ísland at luttaka á eini stórari ráðstevnu og framsýning. Við verða 12 lond, og verða Føroyar saman við Íslandi og Grønlandi høvuðsattraktiónin**

FRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Hendur og Hugflot datt tíverri niðurfyri í ár, men sum ein uggi fara nakrir føroyingar yvir til Íslands, har teir tann 20. – 24. november skulu luttaka á eini ráðstevnu og framsýning. Her verður handverk og mentan sett í hásæti.

– Akureyri býur skipar fyri, men tiltakið verður hildið í Laugardalshøllini í Reykjavík, greiðir Anna Louisa Joensen frá, sum m.a. saman við Randi Vang hevur skipað fyri ferðini.

– Vit hava gjørt okkum stóran ómak at fáa fólk við, og ein rúgva av tilfari er nú sent til Íslands við Eimkip.

Ullvørur, bundnar vørur, lutir úr horni, vevaðar vørur, trælist og nógv annað mynda føroysku framsýningina yviri í Íslandi.

Eisini fara tveir bátasmiðir at byggja ein bát yviri í Íslandi. Kjølurin er longu strektur í Føroyum og tvey borð eru gjørd, og skal restin gerast á framsýningini.



*Henda myndin er tikin frá Hendur og Hugflog í Føroyum tað eina árið. Nú fara føroyingar yvir til Íslands at luttaka á stórari handverksframsýning*

### Menna samstarv

– Vit hava sett okkum í samband við fólk, sum vit meta standa fyri dygdarvørum, og tey hava lagt eitt stórt arbeiði í at fáa alt avstað, sigur Anna Louisa.

Og tað er heldur ikki smávegis av plássi, sum bíðar føroyingunum yviri í Laugardalshøllini í Reykjavík. Føroyingar, grønlendingar og íslendingar fáa 100 fermetrar í part at sýna fram á, meðan hini londini hava nógv minni pláss.

Áðrenn framsýningina verður ein ráðstevna, og har skal Ása Hátún millum annað halda fyrilestur um mentan og handverk í Føroyum.

– Hendan ráðstevnan verður hildin fyri at menna samstarvið millum handverksfólk í hesum partinum av heiminum, sigur Anna Louisa.

Teir flestu føroyingarnir, sum fara yvir til Íslands, vænta at fáa selt nakað av vøru og møguliga eisini finna nakrar nýggjar kundar.

So sjálvt um Hendur og Hugflog fór í vaskið í ár, so er tað boð eftir handverksfólkunum í Føroyum uttanlands.

Londini, ið við verða eru, Áland, Finland, Letland, Kanada, Føroyar, Litava, Danmark, Grønland, Noreg, Estland, Svøríki og Ísland.

# Fløga full av frøi




**Í sambandi við Nósa Barnaprix er nú givin út ein fløga við øllum finalistunum. Níggju skeringar eru á fløguni, sum finalistarnir hava sungið inn í JAK ZAk studio**

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Nósa Barnaprix sá fyrstu ferð dagsins ljós fyrr í ár. Leygardagin 9. november var ein risastóra finala á Kambsdali.

Í sambandi við Nósa Barnaprix er nú ein fløga komin út. Á fløguni eru sangir, sum teir sjey finalistarnir syngja, umframt ein nýggjur Nósasangur, sum James Olsen syngur. Hann er bæði við sangi og sum instrumentalt lag.

– Henda fløgan er úrslitið av Nósa Barnaprix, og hava allir finalistarnir verið í studio og sungið inn, sigur James Olsen, sum er annar av stigtakarunum. Mark Joensen er hin.

– Tað var ongin trupulleiki at fáa børnini í studio. Tey hava verið virkuliga røsk alla tíðina og klárað seg ótrúliga væl. Undirtøkan fyri prixnum hevur eisini verið so góð, at hetta verður heilt vist eitt aftúrvendandi tiltak.

Onki annað slíkt sangtiltak er fyri børnini í hesum aldursbólkinum. Tað verið seg børn frá 7 til 14 ár.

### Fløgan

Fløgan er ein løtt og glað fløga. Finalistarnir hava veruliga megnað at syngja sangirnar væl og reint inn.

Sangir hjá Brandur Enni og Kulum Rótum ganga fleiri ferðir aftur á fløguni.

Men tað er ógvuliga løgið at hoyra til dømis eina gentu syngja um Kingoson, sum Brandur syngur um við Kulum Rótum. Men at tað er løgið merkir ikki, at tað ikki er gott. Tí tað er tað.

Allir sjey sangararnir koma væl frá uppgávuni. Sangirnir eru popputir, sjálvandi, og tað ger, at ein kanska gerst eitt sindur betri í hýri av at lurta, og kanska enntá fær hug at syngja við.

So um ummæli skal gevast, so er ongin ivi um, at allir sum ein hava bestaðið hesa uppgávuna – bæði væl og virðiliga.

# Pedagogflokkur fór heim

**Orsaka av at ongin stova var tøk til annan flokk á námsfrøðiligu útbúgvingini á Føroya Læraraskúla mikudagin, bleiv ongin undirvísing í námsfrøði og tískil fóru næmingarnir til hús. Frá Læraraskúlanum verður sagt, at talan var um eina misskiljing, og at ein stova var tøk**

LÆRARASKÚLIN
*Solby A. Eliasen*

Sosialurin hevur tosað við onkrar av næmingunum í flokkinum, sum fílast harðliga á hendingina mikudagin. Tey greiða frá, at tey skuldu fyrst hava handarbeiði, men handarbeiðsstovan á Læraraskúlanum var upptikin og tað endaði so við, at tey fóru í smíðstovuna at hava handarbeiði.

Aftan á handarbeiði skuldu tey so hava námsfrøði, men tá tey komu til ta vanligu stovuna hjá flokkinum, vísti tað seg, at hon var upptikin. Síðani fingu tey ávíst eina aðra skúlastovu, men har var eisini fólk.

- Tá segði lærarin við okkum, at nú royna vit eina stovu afturat, men um hon eisini er upptikin, so fara tit til hús, tí hetta kann ein ikki bjóða fólki, greiðir ein av næmingunum frá.

Í tí triðju stovuni var eitt skeið, so næmingarnir sluppu heldur ikki inn har, og tískil fóru tey til hús.

- Hetta er omanfyri alt lágmark og so tosa tey um at taka ein flokk av námsfrøðingum inn aftur at komandi ár. Hvar skal tann flokkurin verða. Hanga uppi undir loftinum, kanska, spyrja næmingarnir.

### Ein misskiljing

Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla sigur, at hendingin mikudagin var ein misskiljing.

- Tað var ein stova tøk til handan flokkin, men tey vóru í skeivum stað, so talan var um eina misskiljing, sigur hann og leggur afturat, at tey á Læraraskúlanum leggja stóran dent á altíð at hava stovur tøkar til flokkarnar.

Men Pauli Nielsen dylir ikki fyri, at Læraraskúlin er alt ov lítil sum er, og tí kann tað til tíðir verða trupult at fáa alt at hanga saman.

- Skúlin er vaksin til tað dupulta tey seinastu átta til tíggju árini, og um vit skula kunna nøkta verandi tørv, so er kravið, at talið á námsfrøðingum verður tað dupulta um fimm ár, greiðir hann frá.

Pauli sigur, at tey royna alt tað tey kunnu at gera tær ábøtur, sum tey kunnu, men veruleikin er, at tað er ov trongt á Føroya Læraraskúla. Hetta sást serliga væl, tá tað kemur til serlærugreinarar og kanska serliga tær handaligu.

- Vit eru so nógv fólk her á skúlanum og so er Venjingarskúlin eisini her, so tað er veruliga trupult, staðfestir rektarin á Læraraskúlanum, og hann sigur samstundis, at tað verður samrátt við myndugleikarnar allatíðina, men tað gongur striltið.

Hann heldur tó ikki, at myndugleikarnir ikki skilja støðuna, sum hon er í dag.

- Myndugleikarnir hava sítt og mugu so eisini raðfesta hareftir, men tað er ongin loyna, at Læraraskúlin í dag ikki hevur tær umstøðurnar, sum ein Læraraskúli eigur at hava, sigur Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla at enda.



# Smakkleys jólasøla

**Tað er smakkleyst og óføroyskt at byrja at pynta til jóla longu fyri hálvan november, heldur fólkalívsfrøðingur**

JÓLASØLA
*Edvard Joensen*

**Kollafirði:** Handilsvindeyguni inni á Langasandi í Kollafirði eru full av jólanissum og kava. Tað er ov tíðliga, sigur fólkalívsfrøðingurin Eyðun Andreasen, professari.

Ljósini glitra. Eftirgjørdur kavi liggur á sprossunum, og jólamenn og kvinnur sita í flokkum í vindeygakarmunum. Álmanakkin sigur 12. november, og tað er lýtt og regn uttanfyri. Ikki serliga jólaligt, hóast roynt verður at gera tað so innan fyri gluggan.

Eyðun Andreasen hevur greiða støðu til hetta at byrja at seta jólapyntið fram longu nú.

– Har eru nakrir handlar, sum skulu tjena eina rúgvu av pengum við ein fart, sigur hann.

Hann vísir á, at tað finnast handlar, sum prófvast bara yvirliva orsakað av jólasøluni.

– Hvat skulu vit við slíkum handlum? Teir hava ikki lívsgrundarlag kortini og eiga í grundini ikki at vera til, heldur Eyðun Andreasen. Og serliga tá vit vita, at tað, vit keypa á jólum, er yvirskot. Nógv er púra óneyðugt. Tá er lætt at koma til ta niðurstøðu, at slíkir handlar eisini eru óneyðugir.

### Heiðin pátrúgv

Eyðun Andreasen vísir á, at jólamenn og tað, vit kalla nissur ella vættrar, einki sum helst hava við jólini at gera.

– Tað er heiðin pátrúgv, sum hevur fingið heiðurspláss í sjálvari høvuðshátíðini hjá kristnitrúnni. Tað hongur ikki saman.

Vættrar hoyrdu hjá gamla føroyinginum til tey fornisku. Og teir vóru verri enn so altíð góðir, vísir Eyðun Andreasen á. Tú skuldi varða teg fyri teimum og ansa væl eftir ikki at arga ella fornerma teir. Tað kom tær bara aftur um aftur í gráum kálvsskinni, um so varð gjørt.

Í dag eru teir fittir og gávumildir, sum als ikki hongur saman við tí, vit annars vita um teir.

Men um nakað kann gerast við hesa gongdina, ivast fólkalívsfrøðingurin í. Tað kundi kanska verið, um kommunurnar og handlarnir fingu einahvørja avtalu, sum segði, at tað var ikki loyvt at pynta handilsgluggar fyrr enn eftir ein ávísan dag. Spurningurin er bara, um tað ber til.



*Hóast vit enn ikki eru komin til meira enn hálvan november, eru handilsvindeyguni longu full av jólapynti*

*Mynd: Edvard Joensen*

### Fremmandir siðir

Jólamenn og nissur hava heldur ikki altið verið tað, vit í dag kenna. Eitt nú í Danmark og Týsklandi hava nissurnar altíð verið, men við øðrum litum, enn tí reyða, vit í dag kenna.

Tann reyði og hvíti jólamaðurin er ein nýggjur, kommersiellur figurur, sum Coca Cola gjørdi í 1930. Litirnir hjá teimum ganga jú aftur.

Annars verður hann sagdur at stava frá erkabispinum Nikolaus, sum livdi í Lítluasiu í triðju øld. Hann skuldi vera gávumildur maður, og haðani skulu so jólagávurnar vera komnar.

Eyðun Andreasen veit eina aðra útlegging av søguni um Nikláa og jólagávurnar.

Á italsku klosturskúlunum í níggjundu øld var vanliga próvtøka fram móti jólum. Tá kom tann siður í, at Santa Nikolaus kom til næmingarnar við próvnum. Tað varð tikið sum ein gáva frá honum, greiðir Eyðun Andreasen, professari, frá.

Í Týsklandi var tað í gomlum døgum Kristus sjálvur, sum kom við jólagávunum. Men hann er so seinni avloystur av Santa Nikláa.

Íslendingar høvdu ikki minni enn 12 jólamenn, ella jólasveinar, sum teir har eita.

Og tveir teirra eru so sanniliga fluttir til Føroya seinnu árini, vísir Eyðun Andreasen á. Tað eru teir báðir Kertustubbi og Greytasleikur, sum eru tveir av teimum 12 íslendsku jólasveinunum.

# Vallandi kelduvað

**Tað rennur framvegis úr Kelduni í Skálafirði. Arbeitt verður dagliga við bygginini av stóra samkomuhúsinum**

BYGGING
*Edvard Joensen*

**Skálafirði:** Stóri, nýggi bygningurin hjá Kelduni í Skálafirði er innilokaður, og farið er undir at stoypa annað byggistig.

Samkoman Keldan i Skálafirði byggir stórt samkomuhús, sum verður gjørt í trimum stigum og skal rúma øllum virkseminum, samkoman hevur yvirhøvur. Neyðugt verður ikki at leiga seg inn í eitt nú ítróttarhallir til stevnur og tílíkt, tá byggingin er liðug, sigur Pauli Høj, samkomuleiðari.

Hann sigur, at upprunaliga var ætlanin at taka fyrsta byggistig av nýggja húsinum í brúk til páskastevnuna komandi ár, men tað verður ikki, staðfestir hann nú.

Arbeiðsgongdin er eitt sindur broytt, so tey heldur enn at gera fyrsta stig heilt liðugt, nú eru farin undir at stoypa annað byggistig beinanveg, meðan amboðini eru á staðnum. Talan er um amboð, sum lænt eru, og tí varð hildið frægast at fáa alt tað arbeiðið av vegnum fyrst, sigur Pauli Høj.

Ætlanin var annars, at alt fyrsta byggistig, sum í høvuðsheitinum er tann stóri møtisalurin skuldi gerast, áðrenn farið varð víðari.

Tað gongur annars rímiliga væl við arbeiðinum upp á fyrsta stig, sigur leiðarin á Kelduni. Teir hava lokað inni og kunnu nú arbeiða alla tíðina uttan mun til veður. Einir 30-40 mans arbeiða sjálvboðið, tó ikki allir í senn. Men onkuntíð munnu vera einir 25 til arbeiðis samstundis, heldur leiðarin.



*Stóri samkomusalurin hjá Kelduni fer at rúma einastaðani millum 800 og 1.000 fólkum. Tá alt er liðugt, verður møguleiki fyri legum, undirvísing, gisting og annars øllum vanligum tiltøkum, samkoman skipar fyri, sigur Pauli Høj, samkomuleiðari*

*Mynd: Edvard Joensen*

Teir eru nú í ferð við at rætta veggirnar av innan, og so verður bjálvað og plátur settar upp kring allan bygningin.

Samstundis verður so stoypt á øðrum byggistigið, so hvørt líkindi eru. Har er grundin komin upp og er sundurskildrað við betongveggum, eins og betongdekk er lagt í.

Verkætlanin er stór. Einastaðni oman fyri tíggju millionir væntar Pauli Høj, at tað fer at kosta, tá liðugt er. Fyribils er arbeitt fyri góðar tvær milliónir, og tær eru goldnar. Alt, sum gjørt verður, er fíggjað við gávum og sjálvbodnum arbeiði. Einki lán er tikið, og útlit eru til, sigur Pauli Høj, at tað heldur ikki verður neyðugt í fyrsta umfari í hvussu er.